Music making a difference
Voices united against AIDS
ONE WORLD BEAT
Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
19. & 20. mars 2004

# Tey tilkomnu eiga leygarkvøldið

**Tá One World Beat alheimstiltakið leygarkvøldið heldur fram í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, er hugnin og góði tónleikurin í hásæti og kvøldið er ætlað tilkomna ættarliðnum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hesa vikuna fylgir Sosialurin stórhendingini, sum Mentanarhúsið í Fuglafirði er karmur um um vikuskiftið. Fyrsti alheims (globali) festivalurin fer av bakkastokki í 40 londum samstundis og Føroyar eru partur av hendingini, ið er vælgerðartiltak til frama fyri AIDS rakt børn. Fríggjakvøld er kvøld teirra yngru, meðan leygarkvøldið er ætlað teim tilkomnu og eru bólkarnir, sum spæla til cafe og dans eisini skipaðir eftir hesum.

Vit hyggja nærri eftir bólkunum og hava spurt teir um manning og hví teir stuðla tiltakinum One World Beat. Tíverri eydnaðist ikki at fáa orð á allar bólkarnar innan evstamark, men vit tekna tó eina nokkso fullfíggjaða mynd av teimum, ið fara á pall leygarkvøldið.


*Ronnie og Sámal eru kendir hvør í sínum lag og síðstu mongu árini eisini sum duo*

## Twilight

Bólkurin er millum royndastu bólkar í landinum og er vælumtóktur til dansitiltøk og veitslur. Bólkurin hevur eisini sermerkt seg á tann hátt, at tað hevur eydnast at halda saman í mong ár og eisini at fáa til vega góða útgerð og ein so frálíkan buss, har rúm er fyri bæði útgerð og góðum ferðamøguleikum. Og hetta er ofta komið væl við hjá bólkinum, sum eittnú hevur verið á tónleikaferð í Íslandi meira enn einaferð.

Í Twilight leika Kartni Fornagerð, bass, Robert Magnussen, guitar og sang, Einar leikar trummur og Hans Andreas Højgaard keyboard og umframt eru eisini aðrir tónleikarar við bólkinum, sum ofta letur bæði tónleik og útgerð til størri tiltøk.

## Tey av Kamarinum

Hesin bólkurin er óivað elsti virkni bólkurin í landinum. Komandi ár hevur bólkurin spælt í 50 ár og er hetta so at siga uttan slit.

– Vit leika á okkara 50'instjúginda ári, í hvussu er eg og Eyðbjørn, sigur Nicolina Jacobsen um tónleikasøguna hjá systkjunum báðum.

Bólkurin hevur givið nakrar útgávur út og telist millum undangongufólkini, sum vóru við frá byrjan innan útgávuvirksemi í Føroyum.

Í dag er manningin hendan: Nicolina, sang, Eyðbjørn, ljómborð, Jóan Petur Andreasen, ljómborð og Árni Andreasen, guitar og hevur henda manning spælt nú í nøkur ár.

## Martin Joensen

Hann kenna vit frá øllum teim frálíku sangunum, sum í dag mangir eru fólkaogn. Fleiri útgávur hevur hann á baki, bæði solo og saman við øðrum. Martin leikar sjálvur guitar og syngur og afturat sær hevur hann góða manning. Eyðun Hansen á guitar, Pauli Magnussen, bass og Jónleif Jensen, trummur.

Tilfarið er alt eftir Martin, men fleiri nýggjar útsetingar eru og so er eisini ymiskt, sum hann hevur givið út saman við øðrum, t.d. Vestmonnum, og ymiskt eftir Martin, sum onnur hava spælt og sungið inn, so lagt er upp til eina hugnaløtu við nýggjum og góðum gomlum, sum mong helst kunnu njóta og kanska eisini syngja við.


*Tey av Kamarinum*

## Ronnie Poulsen

Hann gjørdist kendur, tá hann tók lut í singer/songwriter kappingini á Hafnia. Hann spælir, saman við Sveini, sjálvandi eisini sítt tilfar, sum er í hesum stílinum og er hetta so sera hóskandi til júst eitt kvøld, ið er skipað sum cafe, har dansurin seinni tekur yvir.

## Fluffy Toys

Tað hevur ikki eydnast at fáa orð á menninar í Fluffy, men teir borga fyri góðum og vælspældum tónleiki frá 60'unum og fram í 90'ini. Teir fimm eru væl samanspældir og fara at taka um endan á stuðulsdansinum leygarkvøldið - Einar, Dagfinn, Bjarni og Kenneth eru nakrir av sera vælspælandi og vælumtókta bólkinum Fluffy Toys.

## Ronnie og Sámal

Teir eru kendir hvør í sínum lag og síðstu mongu árini eisini sum duo. Teir eru í fólkatónleiknum fyri tað mesta og fólk flest kenna seg aftur í tónleikinum, sum dugnaligu tónleikararnir og undirhaldararnir borga fyri. Ronnie Nielsen og Sámal Ravnsfjall hava mangan Kolbein Simonsen afturat sær á bassi og ger tað ikki støðuna verri, heldur tvørtur ímóti.

## Afeginn

Hetta er sera vælleikandi danskur bólkur, sum eisini tekur lut í One World Beat og teir hava lagt seg eftir folk-rock tónleikinum, so teir hóska eisini væl í heildina.

## Tey tilkomnu

Allir tónleikararnir, ið tað eydnaðist at koma í samband við innan evstamark, siga seg fegnast um tiltakið.

– Tað er gott, at slíkt verður gjørt, tað kundi gott verið oftari, at slík hjálpartiltøk vóru, sigur Nicolina Jacobsen.

– So avgjørt eitt gott tiltak og spennandi er, at tað er globalt. Vit eri við gleði við til at stuðla, sigur Martin Joensen.

Og Kaj Johannsen frá FUT, sum samskipar tiltakið, hevur eisini borið fram, at vælvildin er sera stór í samband við fyrireikingarnar.

Lagt er upp til eitt gott og hugnaligt leygarkvøld fyri tilkomna lurtaran í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og so kann ein enntá stuðla góðum endamáli, bert við at hugna sær og njóta góðan tónleik.

### Fakta

One World Beat er alheimsfestivalur, har øll arbeiðsorka er sjálvboðin og peningurin fer í ár til børn, ið hava Aids/HIV. Felagsskapurin Keep a Child Alive arbeiðir fyri hesum og fær peningin.

Føroyar eru partur av alheimsfestivalinum, sum fer av bakkastokki í 40 londum samstundis. Í Føroyum er Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um tiltakið 19. og 20. mars.
FUT er høvuðsfyrireikari. Til ber eisini at stuðla við at fara inn á heimasíðurnar hjá omanfyri nevndu felagsskapum.

Í Føroyum fara dugnaligir á pall í Fuglafirði um vikuskiftið; fríggjakvøldið er fyri yngraættarliðið og leygarkvøldið meira fyri tey tilkomnu, har hugnin er í hásæti við tónleikacafé og góðum dansi.

**Keep A Child Alive**
Keep A Child Alive hevur til endamáls at útvega lívsneyðugan heilivág til tær 3,2 milliónirnar børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS) í triðja heiminum. Hvønn minutt doyr eitt barn, tí at tað ikki hevur atgongd til lívsleingjandi antiretrovirala (ARV) viðgerð, og Keep A Child Alive hjálpir við at útvega antiretroviralan heilivág til tey børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS).
www.keepachildalive.org

**One World Beat**
One World Beat er eitt non-profit-tiltak við høvuðssæti í Sveits. Endamálið er at savna samfelagsáhugaðar tónleikarar og vælgerð til frama fyri sosiala broyting; Tónleikur ið ger Mun!
One World Beat er eitt samtak av sjálvbodnum, og festivalurin loyvir tónleikarum og sjálvbodnum framat einum palli at bera sín boðskap fram, meðan teir styrkja tilvitanina hjá øllum Heiminum. Á hendan hátt útvegar festivalurin alneyðugan pening til at stuðla neyðstøddum. One World Beat samstarvar á hvørjum ári í felag við nógvar vælgerðarstovnar um hetta málið.
www.oneworldbeat.org




NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MARS 2004**

SKRÁIN VIKA 10–11

**Fríggjadagur 19. mars**
**Kl. 09.00** **Málráðstevna 2004** Fyriskipari er Føroyska Málnevndin

**Sunnudagur 21. mars**
**Kl. 16.00** **Føroya Symfoniorkestur** Spæld verða verk av Aron Copland, Bela Bartok Arutjunian og Dvorak. Dirigentur: Bernhard Wilkinson

**Mánadagur 22. mars**
**Kl. 19.30** **ENEKK og Afenginn - konsert** Framført verður alt frá kvæðum, kingosangi, fólka- og spælimanstónleiki til nýggjan rokk og jazztónleik.

Atgongumerki keypt seinast 12. mars kr. 100.-, aftaná er kostnaðurin kr. 150.-

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo



Fylg við...

... í spennandi endaspælinum í Champions League á TV3+ og Viasat Sport í Televarpinum.

Nógvar nýggjar áhugaverdar sendingar byrja í næstum á TV3 og TV3+

hygg inn á www.televarp.fo

Televarpsmóttakari fyri einans 1.695,- spar 500,-

Tilboðið er galdandi, tá tú teknar televarpshald




Televarpið
tel 340340
televarp@televarp.fo

team85





Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 172 fólk á 16 deildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á menningardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 8 fólk.

MENNINGARLEIÐARI VIÐ VISJÓNUM

Vit sóknast eftir leiðara til nýggju menningardeild okkara.

Menningarleiðarin gerst partur av einari fyritøku við hugsjónum og málum innan prosess- og produktmenning.

Fyritøkan skal støðugt mennast, so Sparikassin eisini í framtíðini megnar at veita kundunum framúr góða fakliga og persónliga ráðgeving.

Fyri at røkka hesum málum krevst ein góður og sjálvstøðugur menningarleiðari við hóskandi útbúgving og royndum á KT- og fyrisitingarøkinum. Ynskiligt er at umsøkjarar hava royndir frá peningastovni, projekt- og leiðsluroyndir.

Uppgávurnar hjá menningarleiðaranum verða at hava dagligu leiðsluna og at skipa arbeiðið á KT- og fyrisitingarøkinum.

Menningardeildin mennir og røkir tøkniliga samskiftið, virkisgongdir og tænastur í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildir Sparikassans.

Menningarleiðarin hevur, við tilvísing til stjórnina, ábyrgdina av KT- og fyrisitingarpolitikki Sparikassans – herundir strategi, bygnaði, virkisgongdum og trygd innan økið.

Trivnaðurin og arbeiðsgleðin millum starvsfólkini hevur avgerandi týdning fyri Sparikassan, og á hesum økjum skal menningarleiðarin vera virkin.

Evnini at samstarva, samskifta og virka í einum umhvørvi, sum støðugt broytist, mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda.

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel 348510
marjun.eystberg@sparikassin.fo

ella til Marner Jacobsen, forstjóra, tel 348571.

Umsóknir skulu verða Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 7. apríl 2004. Tær skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ